PC-SPØL BÍLIGA TIL SØLU
Alone in the dark, Nocturne, Incoming, Half-life, Flight Simolator 2000 og onnur bíliga til sølu.
Tlf. 257121

TELDA UTTAN SKERM
AMD – Athlon XP 1800t, 256 MB-DDR Ram, 40 GH harddisk Geforce 4, 64 MB DDR. Mús, keyboard og hátalarar 10.000 kr.
Tlf. 252916

GOTT TILBOÐ
Stór Toshiba Satellite fartelda við DVD og øllum tilhoyri, bíliga til sølu.
Tlf. 361372

SKERMUR 17"
1268x1024, til sølu fyri kr. 1.750,- Skermkort /Geforce 3 Ti200, 64 MB TV-inn og TV-out til sølu fyri kr. 1.900,- (2400,- nýtt)
Tlf. 310070/224018

FARTELDA
Fujitsu Siemens Amilo fartelda til sølu. Bert 8 mðr. gomul. Sera vælegnað til skúlabrúks. Meira fæst at vita á
Tlf. 220296

BÍLIGUR TELDUSKERMUR
IBM 17'' teldusker mur (1280x1024) til sølu fyri kr. 1750,-
+298 22 40 18

Tónleikur

KEYBOARD TIL SØLU
Eitt lítið brúkt Yamaha keyboard til sølu fyri 2300 kr. Demodiskil fylgir við.
Ring 224719

HÁTALARAR
Tveir TWIN Reflex Digital Speaker av slagnum DANTAX MC 302 200/300 W til sølu fyri 1000 kr.
Tlf. 441893

BANDUPPTAKARI
Ein 4-sporaður Philips HiFi Stereo 4407 bandupptakari við spolum til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 441893

TIL SØLU
Roland D50 Synthesizer, 1400 kr. Roland M-240 Line mixer, 3000 kr. Roland Sound canvas, ljóðmodul, 3000 kr. Bassforsterkari YS BL0080, 80W, 1500 kr. Emagic, Notator logic, tónleikaforrit til Macintosh teldur, 1000 kr.
Tel. 311443

TIL SØLU
Pioneer forsterkari 2 x 100 w, Pioneer fløgu-spælari, 2 JBL 150 w hátalarar, JVC MiniDisc recorder. Til sølu fyri 6.000 kr.
Tlf. 220284

HEIMASTUDIO TIL SØLU
Ein óbrúktur 1/2 ára gamal Fostex X-24 multitracker til kasettubond: v/ 4 sporum + 2 x XLR input og 6 útgangir. Nýprísur 4300 til sølu fyri 2500 kr.
Tlf. 260590

FENDER HEARTFIELD
líkist Stratocaster, í góðum standi. www.42nd.net 2.750,- kr.
Tlf. 447254

Út- & Sjónvarp

TIL SØLU
Eitt sera gott Philips radio frá 1973. Radio er sera gott, sær út sum nýtt.
Tlf. 266793

SJÓNVARP
21″ Samsung sjónvarp til sølu fyri 1800 kr. 2 1/2 ára gamalt, sera vælhildið.
Tlf. 228468

PARABOL
120 cm. parabolskál v/ stativi til sølu fyri 1700 kr. Gevur tær Sci-Trek o.a. kanalir sum vanliga ikki sígggjast í Føroyum. Sum nýggj.
Tlf. 228468

TIL SØLU
Ghettoblaster við band og fløguspælara til sølu fyri einans 750,- Radio riggar ikki.
Ring: 257461

TIL SØLU
Tandberg radio av slagnum Huldra 10.
Tlf. (+45) 22438134

Ymiskt

HARMONIKUFERÐ
Harmonikuferð fyri tvey við Norrønu, 26.-28. august, til sølu.
Tlf. 220507

TIL SØLU
2 stk. H-Vindeygu B: 129 cm. H: 129 cm. 4 ára gomul og í góðum standi.
Tlf. 319022
ella 215681

TIL SØLU
Video-walkman (VHS) Kr. 2.000,-
Tel. 252889

JBL HÁTALARAR
2 stk. sera góðir og stórir JBL gólvhátalarar (LX-66), 4 ohm, v.titanium, diskanti v.m. til sølu, Kr. 2.000,- (nýprísur uml. 6.500,-).
Tlf. 320014

DVD TIL SØLU
Spildurnýggjur DVD-spælari av merkinum UNITED,DVD/CD/VCD/MP3 v.m. - v. 2 ára garanti til sølu, Kr. 1.100,-
Tlf. 320014

FERÐASEDLAR VIÐ NORRØNU
2 ferðaseðlar við Norrønu – harmonikutúrin – í 4-manskamari til sølu fyri 1590 kr.
Tlf. 457002

FERÐ TIL SØLU
Mini-cruise: Tórshavn-Bergen og aftur, í 4 koyggjukamari við hondvaski, íroknað einaferð tað stóra kalda borðið fyri tvey. Skal brúkast í summarsiglingarskeiðnum 2002 til sølu fyri 1500 kr.
Tlf. 257986

ÚTHURÐ TIL SØLU
Ein nýggj úthurð altan/terassu við sprossarútum til sølu.
Tlf. 311612

UNGDÓMSVENJARI
H71 søkir eftir ungdómsvenjara. Løn eftir avtalu.
Ringið 319822 (Jógvan Elias)
ella 320242 (Andras)
um nærri upplýsingar.

MYNDIR
28 myndir av ólavsøkuskriðgonguni 2002 til sølu.
Tlf. 361356

FERÐASEDIL
til harmonikutúrin við Norrønu tann 26. august til sølu.
Tlf. 371515

RUNNAR
Tríggir runnar (h. 1,0 m. 1,3 m. 1,9 m.) við avbera vøkrum, náttúruliknandi og ongantið følnandi bløðum til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 441893

AMATØR RADIO-ÚTGERÐ
Ein Sommerkamp SSB Transceiver FT 250, ein BW Antenna Tuner Model VS 300 A, ein DATWA Electronic Keyer, ein hátalari ein SWR-meter model TTS og tvey skeiðhefti + morsu-hond (alt alfabetið) til sølu fyri 4500 kr.
Tlf. 441893

YNSKIST
Seymimaskina ynskist.
Tlf. 212358

FORMEL 1
2 ferðaseðlar til sølu til Formel 1 í Belgia.
Tlf. 421766

LAKERAÐ SVINGTRAPPA
úr límtræi, í góðum standi, 1/2 sving (180º), hædd 262 cm., breidd 80 cm, selist fyri 5.000 kr.
Tlf. 318675

TIL SØLU
Billardborð 3/4 match. Borðtennisborð. Trærennitól (drejebænk) við 8 skurðjørnum. Lítið frystiskáp
Ringið á tlf. 422302
best aftan á kl. 18

FERÐ TIL SØLU
Mini Cruise: Tórshavn-Bergen og aftur fyri ein í 4-koyggjukamari við hondvaski. Brúkast í summarsiglingsskeiðnum 2002 til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 422352
ella 216352

VENJARAR
Øll, sum hava áhuga í at vera venjari hjá Støkk komandi fimleikaár, eru vælkomin at ringja á tlf. 222447 áðrenn 9. august og hoyra nærri.
Fimleikafelagið Støkk

MISSIÓNSHÚSIÐ Í SKÁLAVÍK
Eydnuhjól verður í Missiónshúsinum leygarkvøldið og sunnukvøldið 10.-11. august kl. 18.00. Um onkur vil stuðla okkum takka vit fyri. Sólrun Christiansen, Friða Olsen, Friðleif Lydersen, Sunbjørg Djurhuus, Majbritt Lydersen, Marita Jacobsen.

BOSCH MULTIBAND
GSM 509 Dual kr. 200,-.
Tlf. 314103 ella 216103

MYNDATÓL TIL SØLU
11/2 ára gamalt Minolta Dynax 500si v/3500 xi blitzi,eini Tamron 28-300 mm. aspheriskari linsu og einum óbrúktum stativi. Nýprísur 13.500 kr. til sølu fyri einans 8000 kr.
Tlf. 260590

MOTOROLA CD 160
fartelefon til sølu fyri kr. 300,-.
Tlf 314103 ella 216103

NOKIA 7110
3 mánadir gomul til sølu. Hon hevur: - WAP -Skjótiklapp (til verjing) - Scrollknapp (til skjótari leiting) - Infrared (til telduna) - Stórt display - 4 spøl -1000 nøvn í goymslu -Vibrator - sí rest á www.nokia.com/phones/7110 .Nýggj: 3000,- Nú: 1500,- inkl.porto.
triton_blue@yahoo.com

VIDEOKAMERA
Canon UC-V 200, hevur 22 x 20 mm/150 x digitalt 200 mm, við fylgja: ladari, taska, 1 band og leiðningar til video 4.000 kr.
Tlf. 447254

NOKIA 3310
í góðum standi, ladari, kassi og brúksforvirring fylgja við. Til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 447254

ERICSSON
T68, nýggj, brúksforvirring, ladari og emballaga fylgja sjálvandi við. Til sølu fyri 3.750,- kr.
Tlf. 447254

ERICSSON
T20S til sølu.
Tlf. 224910

FLYTING
av sofu úr Danmark til Føroyar. Er tað nakar, sum hevur pláss at taka eina sofu við úr Danmark til Føroya. Vit gjalda fyri eykaútreiðslur.
Tlf. 322077

OLJUTANGI
Innioljutangi 1200 l. við tilhoyr, til sølu. Kostnaður 1.000,- kr. Hevur bert staðið inni.
Tlf. 317636

URTAGARÐSMOLD
Góð urtagarðsmold fæst við at ringja:
Tlf. 218328

VINDEYGU
1 vindeyga B: 109cm; H: 118cm og 1 vindeyga B: 69cm; H: 118 cm. Í góðum standi. Til sølu fyri 350 kr. stk.
Tlf. 423572 / 210560

NOKIA 5510
Tvær Nokia 5510 til sølu. Prísur: 1.500 kr. pr. stk.
Tlf. 251237 / 266447

VINDEYGU
1 stk. vindeyga B: 178cm; H: 118cm (føst ramma). 1 stk. vindeyga B: 118,8cm; H: 80cm (uttan rút). Í góðum standi bíliga til sølu.
Tlf. 315089

Budgetrestriktiónin
Budgetrestriktiónin avgerð hvat ein forbrúkari kann keypa – tess størri budget, tess størri nýtslu. Brúkarin velur sjálvur hvat verður keypt, tvs. um hon velur at innflyta okkurt, ella um hon keypir heimamarknaðarvørur.

Tískil kann eg ikki skilja at Búskaparráðið skrivar:

»Gjaldoyra kann býtast við innflutningsvørur, men hevur onga ávirkan á hvussu nógv kann framleiðast av heimamarknaðarvørum.«

Er tað ikki brúkarin sum avgerð um hon velur at nýta inntøkuna til at keypa heimamarknaðarvørur ella innflutningsvørur?

Kann tað vera rætt at størri útflutningur av fiski ikki skapar størri heima-framleiðslu í Føroyum? Er tað ikki júst tað vit uppliva júst nú, hvar inntøkuvøksturin í fiskivinnuni bæði skapar størri innflutning og størri framleiðslu á heimamarknaðinum?

Ein vøkstur í inntøkuni veksur um budgettið hjá brúkaranum og tískil keypir hon meiri av øllum teimum vørunum henni lystir – heimamarknaðarvørur eins væl og innflutningsvørur.

Á búskaparfrøðiligum máli kann sigast, at »vanliga verður Walrasianska javnvágin givin av præferansunum hjá brúkaranum, sum nyttumaksimerar út frá budgetrestriktiónini, givin av prísunum og inntøkuni.«

Á føroyskum vil hetta siga, at inntøkan frá fiski eins væl kann nýtast til heimamarknaðarvørur og innflutningsvørur, alt eftir hvar brúkarin fær størst gagn av tí.

Hesin feilur, at budgetrestriktiónin er gloymd, verður endurtikin fleiri ferðir í frágreiðingini frá Búskaparráðnum.

Crowding out
Í myndlaskitsuni hjá Búskaparráðnum hava inntøkur frá fiskivinnuni og ríkisveitingini onga ávirkan á fólkaflytingina til ella úr Føroyum. Sostatt økist arbeiðsmegin, og harvið framleiðsluorkan, ikki tá inntøkan frá fiskivinnuni ella ríkisveitingini økjast. Sagt verður:

»Givið at gjaldoyragávurnar hava eina ávísa stødd, antin tær koma úr Danmark ella upp úr havinum, fæst bara meiri av eini vøru, um minni verður framleitt av eini aðrari vøru. Skulu tøku framleiðslumiðlarnir framleiða meira av einari vøru, mugu teir framleiða minni av onkrari aðrari vøru, líkamikið hvussu nógvir pengar koma í umfar afturat.«

Ein vanligur búskaparfrøðingur vildi nokk spurt: »Hevur Búskaparráðið nú avskaffa multiplikatorvirkningin?«

Um tað skal vera rætt at ongin multiplikatorvirkningur er uppá langt sikt, skal búskapurin hava eina vælvirkandi crowding out mekanismu og tískil skulu vit hava fult crowding out uppá langt sikt. Hetta hava vit, sum áður nevnt, ikki í Føroyum, m.a. orsakað av fólkaflytingini.

Undarligt nokk, so vísir javnvágsmyndilin at støðan er øðrvísi um talan er um olju:

»Framleiðslan kan økjast ... tí at økti vælstandurin, ið økta framleiðsluorkan gevur, fer at tiltrekja meira arbeiðsmegi úr útlondum, bæði føroyingar og onnur.«

Sostatt kann oljan draga fólk, men inntøkur úr fiskivinnuni ella ríkisveitingini kunnu ikki! Hetta hongur í míni verð ikki heilt saman! Er so stórur munur á pengum alt eftir hvørji vinnu teir koma frá?

Eg vil ikki fara longur við tí her, men heldur lata kjakið halda áfram í búskaparfrøðiligum vísindaligum tiðarritum, har tílíkt teoretiskt kjak heldur hoyrir heima.

Týdningarmikið av hava myndlar
Kritikkurin skal tó ikki skiljast sum um at eg haldi tað vera skeivt at byggja ein javnvágsmyndil fyri Føroyar. Tvørturímóti er mín fatan, at myndlarnir geva eina góða vitan um samfelagið, sum vit neyvan kunnu fáa uttan einhvørja myndlabyggjan.

Kritikkur skal tó vera ein náttúrligur partur av kjakinum um myndlarnar, tí kritikkurin avdúkar veikleikar, so myndlarnir við tíðini gerast betur.

Búskaparfrøði líkist flest øllum øðrum í lívinum – fólk hava ymiskar fatanir, talan er ikki um ein veruleika, men um ymiskar fatanir av veruleikanum. Myndlarnir eru við til at strukturera fatanina av veruleikanum, so búskaparfrøðingar hava lættari við at kjakast.

Tó vil eg nokk ikki geva meiri enn 03 ella 5 fyri skitsumyndilin hjá Búskaparráðnum. Men tað kundi verið serstakliga áhugavert at hoyrt eitt óheft skoðsmál av onkrum útlendskum serfrøðingi sum fæst við myndlabyggjan.

Christian Høgni skal finna stevið á vongverjanum

Runavíkingurin í Vejle, Christian Høgni Jacobsen, skal sunnudagin royna seg ímóti Hvidovre, har føroyingurin skal royna at halda stevið frá seinasta vikuskiftið, tá legði upp til málið hjá Vejle.

Mynd: Savnsmynd

Liðskiparin í Vejle er við aftur, men hetta viðførur neyvan, at føroyingurin verður á beinkinum sunnudagin ímóti Hvidovre.

1.DEILD DANMARK
Páll Holm Johannesen

Christian Høgni Jacobsen og Vejle skulu í øðrum umfari í donsku fyrstu deild leika ímóti Hvidovre. Í fyrsta landskappingardystinum í ár, eydnaðist Vejle at vinna á útivølli ímóti uppflytarunum úr Brønshøj.

Hvidovre, sum er fyrrverandi felagið hjá føroyska landsliðsleikaranum, Óla Johannesen, vann eisini sín dyst seinasta vikuskiftið.

Vejle er á heimavølli, og tí seta Christian Høgni og hansara menn nøsina uppeftir trimum stigum. Hóast Vejle-liðið er sera ungt, so hava tey góðar vónir í felagnum, at liðið fer at standa seg væl í ár. Leiðslan í Vejle hevur sett sær sum mál, at innan tvey ár, skal felagið hava uppbygt at somikið gott lið, at felagið aftur verður at sígggja í Superliguni.

Christian Høgni á óvandum plássi

Í dystinum seinasta vikuskiftið ímóti Brønshøj, royndi Christian Høgni seg sum høgra vongverja, og væl gekst, tí runavíkingurin legði upp til einasta málið í dystinum. Væntast kann tí, at Christian Høgni aftur verður at finna á høgra vongverja sunnudagin ímóti Hvidovre.

Í vár spældi Christian Høgni einamest í álopinum, men eftir at Vejle ognaði sær evnaríka áleyparan, Michael Blom, hevur runavíkingurin verið noyddar at tikið til takkar við at spælt á øðum plássum enn í álopinum.

Til dystin sunnudagin, verður Vejle-liðskiparin, Calle Facius, við aftur, eftir at hava verið leikbannaður ímóti Brønshøj. Hetta ger, at Vejle-venjarin, Frank Petersen, helst ger nakrar broytingar á liðnum, so pláss verður fyri Calle Facius á miðvøllinum.

Møguligu broytingarnar á Vejle-liðnum, skuldu ikki havt við sær, at Christian Høgni ikki skuldi verið ímillum teir fyrstu ellivu hjá Vejle sunnudagin, tí hansara avrik seinastu vikurnar hava verið sera sannførandi.

HEILSANIR

Mamma!
Tillukku í dag.
David og Tonga

Til skiparan lítla hjá ommu!
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við prógvinum og føðingardegnum.
Omma og abbi

Góða Teresa
Hjartaliga tillukku við 9 ára føðingardegnum. Eisini ein heilsan til Rebekku.
Heilsan gumman og Aron

Góði Per abbin
Hjartaliga tillukku við 60 ára føðingardegnum sunnudagin 11. august.
Kærastu heilsanir frá Rúna

Hey fitti Edvard!!!
Hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardegnum í dag. Eisini ein heilsan til Súnhild.
Bestu heilsanir Natasha

Góðu mamma, pápi og verforeldur
Hjartaliga tillukku við silvurbrúdleypsdegnum. Alt tað besta í framtíðini.
Heilsan Marta, Ása, Heini, Tina, Teitur, Bjørt og diddan

Góðu tít bæði
Hjartaliga tillukku við hjúnabandsdegnum, og Rannvør takk fyri tíðina á vøggustovuni.
Heilsan vit allar

Góði fitti Edvard!
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum í dag. Takk fyri í summar. Eisini ein heilsan til hina á myndini. Alt tað besta.
Ynskja omman og abbin á Sandi